DAGSINS MEINING

Eldraøkið ella samferðsla?

Eftir øllum at døma verður tað, sum politikarar nú kalla eldraøkið, raðfest hægri á næstu fíggjarlóg. Somuleiðis benda politiskar viðmerkingar á, at meira skal hugsast um tey gomlu á tí fíggjarætlan, sum skal gerst fram til 2011, og sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ætlar at fáa gjørda lidna í hesum mánaðinum.

Orðaskifti tók seg upp fyrst í vikuni, tí Vinnumálastýrið boðar frá, at iløgurnar á næstu fíggjarlóg fara at økjast munandi. Orsøkin er, at so nógv skal gerast á samferðsluøkinum. Landsstýrið hevur m.a. álagt landsstýrismanninum Bjarna Djurholm at fremja fleiri ætlanir og harafturat byggja eitt nógv størri og dýrari suðuroyarskip enn upprunaliga ætlað og mett. Men Karsten Hansen hevur svarað aftur, at iløgurnar skulu ikki økjast eini hálvthundrað milliónir, sum Vinnumálastýrið leggur upp til. Og so var eldur í skálanum.

Sum nakað nýtt, og sum eitt stórt framstig, hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum bjóðað andstøðuni at verða við í arbeiðnum at gera eina langtíðarfíggjarætlan. Í hesum sambandi hevur formaðurin í Javnaðarflokkinum boðað frá, at Javnaðarflokkurin mælir til at brúka nógv meiri pening til m.a. røktar- og ellisheim, tí fleiri hundrað fólk standa á bíðilistum at sleppa inn á heim.

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Helena Dam á Neystabø, er óivað samd við Javnaðarflokkinum, tí herfyri boðaði hon frá, at nú mugu ætlaðar íløgur á samferðsluøkinum skjótast út, tí á eldraøkinum er tørvurin so ómetaliga stórur. Hesar báðar viðmerkingarnar frá partvíst einum samgonguflokki og partvíst einum andstøðuflokki skuldu merkt, at tað fer at eydnast at fáa meiri pening til eitt øki, sum er fullkomiliga forsømt í hesum landsstýrisskeiði.

Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, vísti nú um dagarnar á, at einki er sett av at byggja ellis- og røktarheim fyri í hesum valskeiðnum. Og tí er neyðugt, sum Jóannes Eidesgaard segði við Útvarpið fyrr í vikuni, at tað verða settar fleiri 100 milliónir krónur av tey næstu árini, tí nógv bíða, og at tað kostar at byggja røktarheim, kanska útvið eina millión krónur fyri hvørt búfólkið.

Nú verður áhugavert at síggja, hvussu leikur endar, og um Tjóðveldisflokkurin, sum áður var ein sosialur flokkur, tekur undir við hesum sjónarmiðunum, ella hann hellir til ætlanirnar hjá Fólkaflokkinum at raðfesta útbyggingar á samferðsluøkinum hægri. Skal eldraøkið raðfestast hægri, verður óivað neyðugt at bíða við ætlanum á samferðsluøkinum, um íløgurnar skulu haldast á búskaparliga hóskiligum støði.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Nei – nú er nokk

Diana í Puntabyrgi
form. í Javna

Javni felagið hjá menningartarnaðum mótmælir eisini ta viðferð,ið menningartarnað fáa frá fólkum í Smærugøtu.

Í Sosialinum lesa vit grein um, at fólk búsitandi í Smærugøtu vilja ikki hava fleiri brekað í grannalagið.

Hetta tí at tveir bústovnar við menningartarnaðum eru har áðrenn, og Sjálvognarstovnurin Sambýlir hevur í umbúna at keypa ein afturat.

Javni mótmælir eisini!
Fólk í grannalagnum mótmælir. Javni mótmælir eisini viðferðini av hesum fólkum, ið hava menningartarn og annað brek. Um ikki øll, so eru nøkur, ið skilja og kunnu lesa.

Hvussu tyngjandi kann tað ikki verða fyri tey og okkum foreldur at lesa slík mótmælir av okkum.

Ein »glotti var at hóma« við hesum keypinum, sum vit vóna skjótt er í lagið og fleiri við.

Hava búð í útlegd
Menningartarnað og onnur brekað í Føroyum eru í stórari íbúðarneyð.

Nógv av teimum hava búð í útlegd í mong ár. Hvør vil standa fram í hesum tíðum og nú forða fyri, at tey fáa innivist heima í sínum egna landið? Hvat um tit,ið mótmæla, fingu somu móttøku, har tit koma!

Menningartarnað og onnur brekað eru komin her og tey verða fleiri og skulu verða her.

At fleiri stovnar og sambýlir verða í sama grannalag tykist at verða neyðugt, sum móttøkan tey fáa frá »hinum« í grannalagnum er. Hvønn skulu tey annaras vitja inn til. Nøkur steingja jú hurðina fyri teimum.

Tyngjandi fyri hvønn
Tað er so tyngjandi verður sagt í skrivinum til Almannna- og Heilsustýrið.

Hvat um er so tyngjandi, er okkum ógreitt.

Góðu fólk í Smærugøtu
Vit skriva 2001. Tíðin er farin frá tykkara hugburði. Í Føroyum skulu føroyingar búgva eisini tey, ið hava ella kanska fáa eitt brek. Vit ynskja ongum nakrað tyngjandi lagnu - heldur ikki tykkum í Smærugøtu.

Men lagnan kann raka ein og hvønn, tá verður ikki spurt um, hvar tú ella tíni búgva.

Áheitan til landsins myndugleikar.
Javni hevur heitt á myndugleikarnar um at fáa innivist til menningartarnað, ið eru í íbúðarneyð. Lati tykkum ikki tálma av hesum. Um rætt varð atborði, so skuldi veri íbúðir, bústovnar og sambýlir í fleiri grannaløgum runt í Føroyum.

Endurtøka
Hetta er tíverri ikki fyrstu ferð at grannaløg mótmæla, men tað endar altíð gott, vónandi eisini her í Smærugøtu.

Javni hevur altíð havt fremst í arbeiðnum at veita upplýsing, tað sær út, sum tað enn er neyðugt at upplýsa.

Bert ov lítil vitan kann fáa fólk at vísa slíkan atburð mótvegis sínum medmenniskjum. Ella er tað annað!!?

Ein stytt útgáva av einari longri frásøgn!

Til samferðslumálaráðharran og landsverkfrøðingin

Petur Dahl Nolsøe
Vágur

Tað er í ordan, at skipið kemur at sigla 20-21 fjórðingar (gamalt var at siga míl) um tíman – longdin, farleiðin – Suðuroy-Tórshavn er 36 fjórðingar, so tað skuldi tikið 1 1/2 tíma at siglt! men, men! hava menn hugsað um, at eitt skip sum er 120-140 metrar langt, skal leggja at kei, skal fara frá kei vendast og dreyast, við síðuskrúvum og so framvegis – er útsynningur/landsynningur í ættini, seinkar tað atløguna/fráferðina!

Siglingarleiðin Tórshavn-Suðuroy (áðrenn undirsjóvar bergholið kemur um eini 40 ár) er sum sagt 36 fjórðingar, kei til kei! Skal tú leggja at í Suðuroy og inn á Drelnes, mást tú seta ferðina niður á Høvdanum í 3-4 fjórðingar pr. tíma, og tað er eitt strekkið, sum er næstan 2 fjórðingar – við 4 míla ferð, so ein og hvør hugnalig sál, sum hevur eitt høvd – uttan flogvit, kemur at ásanna, at ferðingartíðin við einum skipi (sum er longri enn »Triton«) kemur at taka 2 tímar og eitt korter, kei til kei!

Tí vil eg staðiliga ráða monnum, og ikki minst kvinnum til at leggja samferðsluna havnina í Tjaldavík, sum absolutt er kervan í Suðuroy! Ein natúrhavn av Guðs náði! Tá verður teinurin Tórshavn-Suðuroy 1 tíma og 20 minuttir! Tá okkara staðkendu skiparar á økinum hava rokna eystfall fyri eystfall og vestfall fyri vestfall!

Vælsignaðir menn! Lavi ikki enn ein brølara! Latið meiniga mannin sleppa framat, og ikki »Dumkopf«! Við ynski um skjótt og gott samband!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Summi byggja land, aðrir bróta niður

Helena Dam á Neystabø
Sjálvstýrisflokkurin

Eivind Jacobsen skuldi verið tann seinasti til at tosað um moral.

Hvar er hansara moralur, táið tað ræður um at røkja áhugamál borgarans. Hvar er hjarta hansara fyri teimum gomlu. Í tveimum lesarabrøvum á rað ger bygdaráðsformaðurin á Strondum nógv burturúr, at tað eru kommunurnar einsamallar, sum rinda allar útreiðslur í sambandi við eldrasambýlini. Um so var, skuldi ein væntað, at í øllum førum Sjóvar Kommuna gekk á odda viðvíkjandi eldrasambýlum.

Men so er ikki.

Fyri tað fyrsta hevur hann tikið Sjóvar Kommunu burturúr sambýlinum, sum undangongumenn hansara vóru við til at byggja upp saman við m.a. Skála kommunu. Við tí úrsliti, at nú hava tey gomlu á Strondum onki eldrasambýli longur, einki tilboð. Og táið Skála og Runavík hava lagt saman, so verða strandingar helst við sviðu soð. Tað má sigast at vera flott – samstundis sum sami maður slær út til høgru og vinstru við skuldsetingum móti Sjálvstýrisflokkinum, at vit hava ikki gjørt nóg mikið fyri tey gomlu.

Fyri tað næsta veit Eivind Jacobsen fullvæl, at kommunurnar rinda ikki einsamallar allan raksturin av eldrasambýlunum. Starvsfólkið, ið starvast á eldrasambýlunum allan dagin fram til á kvøldi fær sína løn frá landinum. Og hon er teimum væl unt, tí tey gera eitt megnar arbeiði, eins væl og nógvar kommunur kring landið gera eitt gott arbeiði á teirra eldrasambýlum.

Leggi ikki í at gera viðmerkingar til, hvat Eivind Jacobsen í lesarabrøvum heldur um mín persón, eg kenni ikki mannin, men muran tykist ikki góð.

300 milliónir krónur meira
– til almanna og heilsuverkið seinastu 3 árini , og vit gevast ikki á hondum.

Tað er ein sannroynd, at játtanirnar til almanna- og heilsuverkið – og tað er millum annað játtanirnar til eldraøkið, til fólkapensjón o.s.fr. eru nógv hækkaðar, meðan Sjálvstýrisflokkurin hevur umsitið hetta málsøki. Síðani 1997 eru játtanirnar til almenna- og heilsuverkið øktar við meiri enn 300 milliónum krónum.

Í ár 2001 fáa føroyskir pensjonistar útgoldið 150 milliónir krónur meira í pensjón enn í 1997. Og aðrar 150 milliónir krónur verða nýttar til at betra um á nógvum økjum innan bæði almanna- og heilsuverkið. So her er als ikki talan um tóm orð.

Men enn eru vit ikki komin á mál. Til tess hevur tíðin snøgt sagt verið ov stutt og upptakið ov stórt. Bæði innan heilsuverkið og innan almennaverkið eru framvegis stórar uppgávur at loysa. Bíðilistar skulu burtur, viðgerðartilboðini skulu vera fleiri og bústaðartilboð skulu útvegast til tey, sum ikki megna hesa uppgávu sjálv. Tíverri megnar eingin at gera hetta eftir einum degi.

Men eg kann vissa sambandsflokkin – bæði Atla Hansen og Finnleif Guttesen og onnur um, at vit fara framhaldandi at vísa í verki, at hjá Sjálvstýrisflokkurin hanga vælferð og sjálvstýri óloysiliga saman. Sambandsmenn ákæra okkum fyri at prioritera sjálvstýri fram um vælferð. Hetta er ein tóm ákæra,ið bert verður sett fram til tess at fjala út yvir, at hjá Sambandsflokkinum lá tað ongantíð fyri at gera tað, sum gerast skuldi fyri tey gomlu.

200 nýggj røktarheimspláss tey næstu árini
Vit eru farin undir at bøta um tann tørv, sum hevur hópað seg upp gjøgnum mong mong ár. Men tað tekur tíð. Og sum eg segði í mínari viðmerking til tíðindini hjá Degi og viku um røktarheimstørvin.

Nú er tørnið komið til at byggja røktarheim í Føroyum.

Tað fyrsta er longu samtykt, og tað skal vera í Sundalagnum. Harnæst skulu vit útvega í minsta lagi 200 nýggja røktarheimspláss tey næstu árini. Íløgan skal fremjast í samstarvi millum land og kommunu. Og tað er ein treyt, at vit semjast um at raðfesta hesar íløgur fram um aðrar skínandi íløgur í m.a. samferðslu.

Og til Finnleif Guttesen, sum ákærir Sjálvstýrisflokkin fyri ikki at hava gjørt nóg mikið fyri Suðuroynna. Suðuroyggin er ikki bara ein oyggj, har býr eisini fólk, og vit hava so sanniliga gjørt nakað fyri fólkið og fyri pensjonistarnar, sum búgva í Suðuroynni, men tað hevur kanska minni at siga fyri borgarstjóran á Tvøroyri.

Yvirtøka av skipaeftirlitinum

Eitt heilt nýtt málsøki, sum kann liggja í Suðuroy

Finnleif Guttesen
Tvøroyri

Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, ætlar at Føroyar skal yvirtaka skipaeftirlitið og leggja tað saman við núverandi sjóvinnufyrisiting, sum er deild í Fiskimálastýrinum.

Ikki bananstatur
Heilt avgerandi er, at Føroyar ikki blíva kosnar sum ein bananstatur viðvíkjandi sjótrygd og tí má regluverkið og umsitingin á báðum økjum í minsta lagið lúka altjóða krøvini, tí annars kemur føroysk sjóvinna skjótt í ringt orð, við harav fylgjandi fíggjarligum og øðrum avleiðingum.

Kostnaður
Mett er, at umleið 10 mill. skulu játtast av Løgtinginum, fyri at halda núverandi støði av skipaeftirlitinum og sjóvinnufyrisitingini.

Harufturat er tað møguligt at yvirtaka málsøki, vitar, farvatnsuppmerking og veðurtænastuna, sum mett kostar 8 mill., íalt, ein kostnaður uppá 18 mill.

Gegni
At henda nýggja deildin ikki skal liggja undir Fiskimálastýrinum sigur seg sjálvt, tá hugsa verður um tær serligu eftirlitsuppgávur, ið fyrisitingin hevur at røkja.

Tí mælti nevndin,ið sett varð til at gera tilmæli um yvirtøku av skipaeftirlitinum, at henda nýggja fyrisitingin, ið fer at fevna um verandi fyrisiting (sjóvinnufyrisitingin) og nýggju fyrisitingina av málsøkinum trygd á sjónum, verður skipað sum sjálvstøðug fyrisiting undir landstýrismanninum í sjóvinnumálum.

Arbeiðspláss
Mett verður at 14 fólk, við ymiskum førleika, so sum til, lógarsmið, sýnsarbeiði, altjóða samskifti,kanningar og skrivstovuarbeiði skulu umsita málsøki trygd á sjónum og er hetta ein upplagdur møguleiki til at leggja umsitingina í eitt øki har hesir førleikar mangla, tí lítið arbeiði við kravda førleikanum er í økinum.

Hesi fólk, við familju, sum koma at arbeiða í umsitingini, fara at menna øki bæði sosialt og vinnuligt, tí tørvurin frá nýggjum arbeiðsplássum fer at seta størri krøv til økismenning.

Politiski viljin
Komandi mánaðirnar fáa vit at síggja, um tað er nakar sum helst politiskur vilji til økismenning ella um tað bert er málageipan.